## Mál og Vegir

Í hesi bók eru savnað uppskot til mál, og hvussu vit røkka málunum fyri teir 13 grundarsteinarnar í Visjón 2015. Bókin Mál og vegir er sostatt ein hugskotsgrunnur, sum øll í samfelagnum kunnu nýta.

Sjøtul varð settur á arbeiðið við Visjón 2015 á heysti í 2005. Landsstýrið valdi eina røð av samfelagsøkjum, ið ætlan skuldi gerast fyri til tess at røkka visjónini um, at Føroyar skulu teljast millum fremstu tjóðir í 2015. Økini, ið fingu heitið grundarsteinar, eru: Alheimsgerð, Útbúgving, Gransking, Íverksetan, Kunningartøkni, Tilfeingi, Samfelagsbygnaður, Infrakervi, Umhvørvi, Mentan, Arbeiðsmarknaður, Vælferð og Sjálvstýri.

Landsstýrið heitti á fólk, ið hava innlit og royndir á økjunum, um at gera uppskot til mál og orða strategiir fyri hvønn grundarsteinin. Hesir bólkar fingu heitið strategibólkar. Samstundis setti Landsstýrið eitt Visjónstorg. Politisku flokkarnir, fleiri fakfeløg og áhugabólkar vórðu boðin at vera við í Visjónstorginum.

## Arbeiðsgongd

Strategibólkarnir gjørdu fyrst uppskot til mál fyri hvønn grundarsteinin, ið vórðu løgd fyri Visjónstorgið til umrøðu. Síðan fóru bólkarnir undir at orða strategiir fyri, hvussu málini kundu røkkast.

Strategipappírini vórðu send Visjónstorginum til hoyringar, so allir limir í torginum høvdu møguleika at koma við viðmerkingum og broytingaruppskotum. Strategipappírini vórðu samstundis løgd alment fram á heimasíðuni www.2015.fo, so at øll við áhuga fyri evnunum, kundu siga sína hugsan.

Strategibólkarnir viðgjørdu viðmerkingarnar og orðaðu endaligu strategipappírini, sum eru savnað í hesi bók.

VISJÓN 2015